KUNNINGARSKRIV

2020

SØRVÁGS KOMMUNA

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Árið 2020 er av álvara farið at halla, og tað er hendan bygdaráðssetan eisini. Um skamma stund fer eitt nýtt ár, nýggjur borgarstjóri og eitt nýtt kommunustýri at taka við. Hetta kunningarskrivið gevur mær sum skjótt fráfarandi borgarstjóri høvi at takka fyri meg, líta aftur um bak og í stuttum greiða tykkum borgarum frá virkseminum í kommununi farna ár. Á síðstu síðunum í skrivinum leggja vit høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2021 og høvuðsyvirlit yvir roknskapin fyri 2019.

Eins og undanfarin ár verður skrivið ikki borið tykkum á dyrnar, men er tað onkur, ið fegin vil hava eitt eintak í hondina, fæst tað á kommunuskrivstovuni.

Fyri stuttum hoyrdu vit í kringvarpinum, at ársins orð er sóttarhald, og tað gevur hugasamband til tað, ið hevur merkt árið. Árið hevur verið heilt serstakt. Á grækarismessu var fyrsti av fleiri tíðindafundum hildin í kringvarpinum, har almennir myndugleikar við løgmanni á odda heittu á okkum øll um at hava gott reinføri, halda frástøðu og ikki at hittast í ov stórum bólkum. Ferðin her hjá okkum eins og kring heimin allan hevur verið sett niður alt árið, og fyri at halda koronasmittuni niðri, hava vit roynt at halda hesi almennu tilmæli um reinføri og sosiala samveru. Tilmælini, sum tíðum eru broytt, hava sjálvandi havt ávirkan á, hvussu okkara gerandisdagur hevur gingið, bæði so og so.

Fíggjarætlanin 2020

Sambært fíggjarætlanini fyri 2020 var ætlanin at gera íløgur fyri 23.5 mió. kr. innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	1.800.000,-
Børn og ung:	10.000.000,-
Undirvísing:	800.000,-
Teknisk mál:	5.900.000,-
Kommunal virki:	5.000.000,-

Innan almanna- og heilsumál er peningurin brúktur til heimið á Sýnini. Innan økið børn og ung var ætlanin, at lántøka upp á 8.5 mió skuldi verða við at fíggja nýggju vøggustovuna. Men av tí at tað arbeiðið ikki er komið so langt, er øll lántøkan ikki framd. Teknisku málini umfata m.a. útstykkingina á Middagsvarða og kloakk, og í økinum kommunalt virki liggur fíggingin av bátabrúgvunum.

Hvat er so framt í verki

Eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita hin 1. januar 2015. Kommunurnar í oynni, ið eru saman um Heimatænastuna í Vágum, skulu sambært lóg veita okkara gomlu og óhjálpnu eina góða og fjølbroytta tænastu. Um somu tíð var **heimið á Sýnini** yvirtikið, og tí tørvaði stórar ábøtur. Yvirtøkan

av heiminum fekk sjálvsagt eisini fíggjarligar fylgjur fyri báðar kommunurnar. Landið veitti okkum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán upp á 15.750 mió. kr. og eitt rentufrítt lán upp á 15.750 mió. kr. Avdráttartíðin av láninum frá landskassanum er 13 ár. Hetta lánið verður goldið í mun til fólkatalið, sum var í kommununum við árslok yvirtøkudagin. Okkara kommuna skuldi avdraga lánið í 4 ár og 8 mánaðir. Sostatt vóru vit liðug at rinda okkara part av láninum frá landskassanum í august 2019. Heimið verður umvælt eftir kostnaðarmeting, sum Landsverk gjørdi. Tá arbeiðið varð útboðið, vísti tað seg, at kostnaðurin var væl hægri, enn mett var frammanundan. Kommunurnar samdust um at hækka sín lut í fíggingini við 5 mió. kr. Okkara lutur í mun til meirútreiðsluna varð 1.8 mió. kr. Sostatt var væntað, at umvælingin í fyrstu atløgu fór at kosta kr. 36.5 mió. krónur

Tíðin hevur víst, at hesin kostnaður heldur ikki. Í skrivandi stund sær tað út til, at kostnaðurin fyri eitt liðugt umvælt heim fer at verða umleið 10 mió meira, enn roknað var við. Hetta er peningur, ið báðar kommunurnar hava játtað. Tá eru tær báðar ovaru hæddirnar, kjallarahæddin og høvuðsinngongdin liðugt umvældar, og økið uttan um heimið og parkeringsplássini eru asfalterað. Íroknað er eisini umvæling av bygninginum niðanúr, vanliga nevndur H-bygningurin, sum er eftir at gera. Tað arbeiðið skal gerast næsta ár og fer væntandi at kosta okkara kommunu kr. 1.3 mió. Peningur er settur av á fíggjarætlanini fyri 2021 til hetta síðsta arbeiðið.

Vesturvón
Heilsurøkt - alt lívið

Heimatænastan og eldraøkið í Vágum eitur nú Vesturvón. Í heyst fekk samstarvið nýggjan samleika, búmerki og heimasíðu: Vesturvón

Børn og ung. Tað er sjálvsagt, at kommunan nøktar tørvin á barnaansing og skapar karmar, so námsfrøðiliga arbeiðið við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, mennir og mentar børn og ung á fullgóðan hátt.

Í fjør ognaði kommunan sær eitt uml. 10.000 fermetrar stórt øki omanfyri Alvalon. Á FÆ2020 varð peningur (10 mió kr.) settur av til at útbyggja **Alvalon** við nýggjum vøggustovum á hesum økinum. Í ár er tíverri ikki so nógv komið burturúr, tó er grundstykkið planerað og ein tunnil er gjørdur undir vegnum millum Alvalon og økið, soleiðis at tú fert at ferðast trygt millum báðar bygningarnar. Eftir ætlan skal projekteringin skjótt verða liðug, so arbeiðið kann bjóðast út, og farið verður undir at byggja.

Sýslan verður nógv brúkt. Um dagin heldur frítíðarskúlin til í henni. Ungdómstilboðið**,** sum læt upp í Sýsluni 1. januar í 2018, er sera væl umtókt. Meira enn 120 børn og ung tilsamans eru limir og ganga í ungdómshúsinum tey fimm kvøldini í vikuni, tá ið opið er. Neyðugt er at viðlíkahalda ein so gamlan bygning, ið verður so nógv brúktur. Tað er drenað rundan um hann, grundin er pussað, í ár var Sýslan klødd við timbri og í løtuni verður síðsta hond løgd á túnið og trappurnar. Har verður flísalagt.

Skúlin hevur verið dagførdur síðstu nógvu árini. Tað síðsta, ið var gjørt, er ventilatiónsskipanin í svimjihøllini og serstovan, ið hýsir øllum næmingum í oynni, ið hava tørv á einum serligum skúlatilboði. Hóast tað ikki var settur nógvur peningur av til løgur til skúlan í ár, hava vit fingið bøtt um m.a. ventilatiónsskipanina í fleiri skúlastovum og gjørt og umvælt annað, sum trongdi til. Skulu okkara børn ikki verða eftirbátar innan KT, er neyðugt at fylgja við tíðini. Tí er eftir ynski frá skúlans leiðslu eisini sett gongd á at endurnýggja alla KT-útgerð skúlans. M.a. er ætlanin, at hvør einstakur næmingur hevur sína egnu teldu innan stutta tíð.

Mykines. Síðsta ár var formlig avtala gjørd millum P/F Magn, Elfelagið SEV, Heilsu- og innlendismálaráðið og Sørvágs kommunu um oljuflutning til Mykinesar. Í avtaluni eru partarnir samdir um at loysa málið um oljuflutning til Mykinesar soleiðis, at tað slepst undan at flyta oljutunnur út í oynna. Beint fyri ólavsøku í ár varð arbeiðið komið so langt, at mykinesfólk kunda bíleggja sær og fáa oljuna koyrda til hús og pumpaða í tangan. Sostatt er málið endaliga loyst!

Tað er ikki altíð, at viðurskiftini laga seg sum ætlað, og serliga ikki á útoyggj. Kommunan hevur í ár bílagt nakað av lyktarsteyrum, smærri útilyktum og øðrum tilfari og ætlaði at fáa umvælt og skift út úti í Mykinesi. Men hagar er ikki altíð farandi. Tá ið viðrar í vár, verður tað flutt út, og umvælingin kann byrja.

Síðstu fýra árini hevur Sørvágs kommuna javnan heitt á landsins myndugleikar og politikarar um at fáa bøtt um ymisk viðurskifti í Mykinesi, ið eru alneyðug at bøta um. Eftir vitjan í oynni við landsstýrismanninum, Hendrik Old, á vári 2018, var bakkaverjan gjørd. Í summar vóru undirritaða, Jørgen Niclasen, landstýrismaður, og stjórin á Landsverki, Sigurd Lamhauge, saman við starvsfólki úti í oynni og hugdu at m.a. havnaviðurskiftunum. Ætlanin var, at Landsverk skuldi gera nýggja brúgv út í

Mykineshólm longu í ár. Men sum skilst, verður hon gjørd komandi vár. Vit í kommununi leggja okkara álit á, at atløgusíðan/lendingin eisini er gjørd og tryggjað, tá ið vunnið er á koronu, og streymurin av ferðafólki aftur sæst í oynni, tí sbrt. landsins fíggjarlógaruppskoti 2021 er peningur settur av til hetta.

Ferðavinnan í Føroyum er alsamt vaksandi, og í okkara kommunu eru náttúruperlur, ið øll ferðafólk vilja vitja. Í ár hevur Visit Vágar í samstarvi við báðar kommunurnar í Vágum gjørt eina felags ferðavinnu- og menningarætlan fyri Vágar og Mykines. Visit Vágar er lagt beinleiðis undir báðar kommunurnar, og Tordis K. á Rógvi Simonsen er okkara nýggi menningarleiðari, ið fer at standa á odda fyri menningararbeiðinum innan ferðavinnu.

Grundøki. Í 2017 keypti kommunan eitt nærum 35000 fermetrar stórt øki til útstykkingar, har pláss er fyri umleið 30 sethúsum og møguligari íbúðarbygging. 23. juli í ár avhendaði S/pf K.J.O borgarstjóranum 17 grundstykki á Middagsvarða. Støddin á stykkjunum liggur millum 615-852 fermetrar. Av tí at so nógv skuldi spreingjast í økinum, var gjørt av at planera øll stykkini, so tey nú, tey skulu seljast, eru klár at seta formarnar á. Møguligir keyparar vóru á fundi við kommununa í hesum mánaðinum kunnaðir um prís, serstøku byggisamtyktina fyri økið og tær treytir, ið settar verða fyri at ogna sær grundstykki. Vit kunnu nú fegnast um, at vit loksins eru komin á mál, og tíðliga næsta ár kunnu keyparar velja sær stykki, og tá verður vegurin í økinum eisini asfalteraður.

Kommunan hevði ætlanir um eisini at fáa **asfalterað** onnur øki í bygdini í hesum árinum, men tað verður at bíða, tí vit fingu tey boð frá veitaranum, at einki asfalt verður at fáa fyrr enn fyrst í næsta ári.

Bústaðir eigur fimm íbúðir í Billubønum. 2018 keypti og planeraði kommunan eitt grundstykki undir Bólheyggi í Sørvági, sum Bústaðir keypti aftur frá okkum. Bústaðir hevur gjørt avtalu við Westtech um, at felagið byggir fimm íbúðir á økinum. 24. juni í ár vóru tær reistar, og væntandi kunnu tey fyrstu flyta inn í februar 2021. Hetta merkir, at tá eru 10 leiguíbúðir í bygdini til tey, ið ikki vilja eiga, men heldur leiga.

Spæliplássið í Bø er í skrivandi stund nærum liðugt. Ynski var um at fáa tað meira innbjóðandi og dámligt. Vónandi verður tað til gleði og gaman fyri bíggjarfólk/børn og vitjandi.

Eitt sindur av peningi var eisini settur av til onkra spæliútgerð til størri børn á **spæliplássinum í Sørvági.** Tað er tíverri ikki komið enn, men væntast skjótt.

Spillivatnsskipanin. Lutfalsliga nógvur peningur hevur verið settur av til dagføring av spillivatnsætlanini síðstu fýra árini. Vísandi til talvuna niðanfyri, so er talan um eina lítla millión í miðal hvørt árið, og tað er ikki so lítið av samlaðu tølunum í fíggjarætlanum kommununnar. Talvan vísir eisini, hvat er sett av á fíggjarætlanini fyri 2021:

Kloakk			
Roknskapur	**Rakstur**	**Íløgur**	**Samanlagt**
2017	kr. 166.000	kr. 801.000	kr. 967.000
2018	kr. 80.000	kr. 608.000	kr. 688.000
2019	kr.190.000	kr. 538.000	kr. 728.000
2020	kr. 190.000	kr. 1.030.000	kr. 1.220.000
Tils.	**kr. 626.000**	**kr. 2.977.000**	**kr. 3.603.000**
Miðal pr. ár	kr. 156.500	kr. 744.250	**kr. 900.750**
Fíggjarætlan 2021	kr. 240.000	kr. 800.000	kr. 1.040.000

Tann parturin, sum gevur mest fyri íløguna, er nú um at verða liðugur. Tað merkir, at alt økið uttanfyri Stórá og út í Geilina er íbundið og verður pumpað út á sjógv. Tó er ein partur av húsunum á Bakkavegi ikki íbundin enn. Okkurt er gjørt í bygdini, men størsti parturin, ið restar í, er í gomlu bygdini, og tað arbeiðið fer at verða sera umfatandi og kostnaðarmikið, so drúgv tíð fer helst at ganga, innan vit eru komin á mál.

Summarið 2018 var annað av tveimum spillivatnsfrárenslurørum lagt út á sjógv í Bø. Í ár hevur Sp/f Grettir við Andrasi Andreasen staðið fyri arbeiðinum at leggja tað seinna frárenslurørið út á sjógv. Sostatt kunnu bíggjarfólk og vit onnur nú fegnast um, at spillivatnsskipanin í Bø er komin á mál. Arbeiðið er liðugt, og væntandi slepst undan ringum kloakkdeymi góðu sólskinsdagarnar komandi summørini.

Kommunan fer eina ferð enn at heita á fólk um at ansa eftir, at einki annað enn væta fer í frárenslini, so tað slepst undan, at tey typpast.

At gera **byggisamtyktir** tekur langa tíð og er als ikki so einfalt, um borgarin skal verða hoyrdur. Og tað skal hann helst. Vinnunevndin hevur í drúgva tíð arbeitt við at dagføra byggisamtyktina fyri **Gásadal**. Eftir borgarafundir, hoyringsfreistir og gjøgnumgongd av innkomnum klagum hevur bygdaráðið eina ferð enn samtykt eina byggisamtykt fyri Gásadal, sum skal gjøgnum vanligu mannagongdina, innan hon vónandi verður galdandi.

Bátabrýr í bátahylinum. Síðsta summar varð uttasti parturin av brúgvunum skiftur, og hann roynist væl, eisini í ringum veðri. Tíðliga í ár var skrivað undir at keypa 100 metrar afturat, sum skulu leggjast í tveimum røðum innan fyri nýggju brúgvarnar. Um páskirnar var bátahylurin dýptur, so klárt var at taka ímóti og leggja brýrnar. Men orsakað av covid-19 eru brýrnar ikki komnar til landið fyrr enn fyri stuttari tíð síðan. Nú liggja tær á landi og bíða til í vár, tá ið veðrið gerst betri.

Umhvørvisplássið (bingjuplássið). Tað er ókeypis at sleppa av við burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássinum. Heitt verður á fólk um at skilja burturkastið væl, ikki at seta rusk uttanfyri plássið og um at leiga bingju frá IRF, tá tey hava nógv burturkast t.d. í sambandi við bygging, umbygging ella annað. Verður komið við dekkum á umhvørvisplássið, so skulu tey IKKI vera á felgunum.

Virki, handlar og aðrar fyritøkur hava onga atgongd til umhvørvisplássið, men eiga ístaðin av hava egna avtalu við IRF um burturbeining av vinnuburturkasti.

Eru ivamál, so hevur IRF ein góða og kunnandi heimasíðu: http://irf.fo/

Opið er soleiðis: týsdag kl.17-18, fríggjadag kl. 17-19 og leygardag kl. 16-18

Fíggjarliga gongdin í 2020

Frá 1. januar í ár er skattaprosentið lækkað við 0,7 prosentum, og vit væntaðu, at tað fór at geva kommununi kr. 1.6 mió. minni í skattainntøku. Hetta fer ikki at halda heilt. Skattainntøkurnar hava tó higartil í ár verið minni samanborið við somu tíð síðsta ár. Um tað er grundað á lækkað skattaprosent ella koronu er ringt at siga. Helst er tað ein blandingur av báðum.

Sammeta vit fyrstu 11 mánaðirnar í 2019 og 2020, so var persónsskatturin í 2019 kr. 44.951.365,- móti kr. 44.361.220,- í 2020. Hetta er ein minking upp á kr. 590.145,- sum í prosentum svarar til -1,31. Endaligi skatturin verður tó ikki avroknaður fyrr enn um heystið árið eftir, og tá kunnu reguleringarnar broyta skattainntøkuna. Í heyst fingu vit ein smekk fyri 2019 upp á slaka millión, so tað hjálpti, at vit fingu væl meiri í partafelagsskatti enn tær 2.0 mió, sum mett var fyri FÆ2020. Raksturin var á leið tað, ið mett var.

Á myndini niðanfyri síggja vit kommunuskattin frá 2015 – 2020



:

Inntøkan fyri 2020 vísir 11 teir fyrstu mánaðirnar í árinum og mett, hvat inntøkan verður í desember.

P/f skattur 2015 – 2020:



Fíggjarstøðan

Nettoskuldin hjá Sørvágs kommunu við árslok 2019 ella ársbyrjan 2020 var 13.6 mió. kr. Í mun til eina álíkning, sum ásett av fíggjarmálaráðnum, var nettoskuldin roknað til 0,26 av eini álíkning og sostatt væl undir markinum upp á eina álíkning.

Tað er torført at siga neyvt, hvussu stór nettoskuldin er við árslok 2020, tí roknskapurin fyri árið verður ikki gjørdur fyrr enn í mai mánaða næsta ár. Men leysliga mett, verður hon helst nøkulunda tað sama sum við ársbyrjan.

Nettoskuldin í mió. krónum pr. 1. jan							
Ár	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Mió. kr.	23.1	20.0	14.3	23.1	25.7	18.9	13.6

Fólkavøksturin í kommununi hevur verið stórur síðstu árini. Fólkatalið vaks úr 1128 hin 1. januar 2017 upp í 1237 hin 1. januar 2020. Tvs. at í kommununi var ein vøkstur upp á 109 fólk í trý ár. Tað tykist tó sum stígur er komin í vøksturin í løtuni, tí hin 30. november í ár var fólkatalið 1220 fólk – ein minking upp á 17 fólk hetta árið.

Fólkatalið í kommununi pr. 1. jan.								
Ár	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Fólk	1084	1087	1079	1106	1128	1172	1202	1237

Fíggjarætlanin 2021

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundinum mánakvøldið hin 30. november 2020 fíggjarætlanina fyri 2021.

Hesi eru høvuðstølini:

Mett skattainntøka:	46.542.000,-	
Mettur P/F skattur:	500.000,-	
Leiga:	764.000,-	
Skattur av eftirlønarinngjaldi:	9.955.000,-	
Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir:	3.716.000,-	
Útvegan av gjaldføri		
Lánsgjald:	8.908.000,-	
Tilsamans:	70.385.000,-	
Rakstur:		53.558.000,-
Afturgjald av skuld:		2.277.000,-
Til íløgur:		14.550.000,-
Fíggjarætlanin javnvigar við:		70.385.000,-

Skattaprosentið verður 21,0% og barnafrádrátturin kr. 6.000,-

Fíggjarætlanin fyri 2021 javnvigar við góðum 70 mió. kr. Inntøkurnar eru mettar til kr. 70.385.000,-. Av hesum er persónsskatturin kr. 46.542.000 og partafelagsskatturin kr. 500.000. Restin er afturbering frá landinum til eldraøkið. Raksturin er mettur til kr. 53.558.000, og kr. 14.550.000 eru settar av til íløgur.

Íløgurnar verða fíggjaðar við 5.6 mió. í rakstrinum, meðan restin slakar 9 mió. verða fíggjaðar við lántøku.

Kommunan fer í 2021 at rinda slakar 2.3 mió. í avdráttum av láninum.

Íløgur í 2021

Sambært FÆ 2021 ætlar Sørvágs kommuna at gera íløgur fyri 16.8 mió. kr. í árinum, sum kemur, men væntar at fáa góðar 2 mió. inn fyri sølu av grundøkjum á Middagsvarða, soleiðis at hetta gevur ein íløgukostna upp á kr. 14.550.000,-. Peningurin fer í høvuðsheitum til bygging av nýggju vøggustovunum omanfyri Alvalon. Peningur er eisini settur av til m.a. umvælingararbeiðið av heiminum á Sýnini, fríðkan av kommununi, arbeiðið komandi vár at leggja bíløgdu bátbrýrnar og til framhaldandi dagføring av spillivatnsskipanini.

Tvs. at íløgurnar eru innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	1.300.000,-
Børn og ung:	12.000.000,-
Undirvísing:	300.000,-
Mentan og frítíð:	0,-
Teknisk mál:	2.700.000,-
Kommunal virki:	500.000,-

Ein av fremstu og týdningarmestu uppgávunum hjá einari kommunu er at tryggja, at karmarnir hjá børnum, ungum og teimum gomlu og óhjálpnu eru nøktandi. Størsti parturin av løgujáttanini fyri 2021 (13.6 mió.) fer tí eisini til økini almanna- og heilsumál, børn og ung og undirvísing - t.e. heimið á Sýnini, nýggjar vøggustovur og skúlan. Nærum 3 mió. fara til teknisk mál, ið fevna um m.a. fríðkan av kommununi, asfalt, vatn- og spillivatnsskipanina. Seinasta hálva mió. fer til kommunal virki, sum umfata iløgur til havnir og lendingar.

Kommunan hevur sett 1.3 mió krónur av á FÆ2021 til **heimið á Sýnini**. Tað er til H-bygningin. Við teimum krónunum vóna og vænta vit, at heimið verður liðugt høvuðsumvælt.

Høvuðsíløgan hjá kommununi næsta ár fer til at útbyggja dagstovnin **Alvalon.** Nýggju vøggustovurnar, sum verða bygdar omanfyri vegin við einari smogu undir vegnum oman í Alvalon, fara at rúma fýra vøggustovum og einum fyrisitingarbygningi við hølum til leiðslu og starvsfólk, øðrum fundarhølum og einum rúmi til húsavørðar. Bygningurin verður umleið 800 fermetrar til støddar, og á FÆ2021 eru kr. 12 mió. settar av til hetta arbeiðið. Hendan íløgan fer at ávirka íløgumøguleikarnar hjá kommununi tey næstu árini.

Til **skúlan í Sørvági** eru – eins og gjørt hevur verið tey síðstu nógvu árini - avsettar kr. 300.000,- til m.a. innbúgv og tøkni.

Á **tekniska økinum** er settar av 2.7 mió. krónur. 400 tús. kr. eru settar av til fríðkan av kommununi, 200 tús. kr. til vatnveiting, 800 tús. kr. til kloakkir, 1 mió til asfalt og 300 tús kr. til arbeiðsbil/bilar.

Á økinum **kommunal virki** er 0.5 mió. kr. sett av til ymiskar útreiðslur á løgujáttanini havnir og lendingar, harav 100 tús kr. eru ætlaðar til at hampa lendingina í Bø.

Farið var undir at skifta gøtuljósini í bygdunum til orkusparandi **LED-ljós** í fjør. Tvs. at vit hava nú í tvey ár brúkt góðar 100 túsund krónur hvørt árið til hetta. Ætlanin er at halda fram við tí, soleiðis at øll ljósini yvir eitt áramál verða skift til LED-ljós.

Sum áður nevnt verður ein lutfalsliga stórur partur av peningi settur av til dagføring av **spillivatnsætlanini**. Fyri næsta ár eru 240 tús. kr. settar av í rakastrinum og 800 tús. kr. í íløgum.

Bygdaráðsval 2020

Týsdagin 10. november 2020 var aftur farið til valborðið at velja sjey umboð at stýra kommununi. 18 fólk á tveimum listum bjóðaðu seg fram. Persónliga valdi eg ikki at stilla upp aftur, hóast hesi fýra árini sum borgarstjóri hava verið góð og lærurík. Úrslitið av bygdaráðsvalinum var, at fimm menn og tvær kvinnur vórðu vald í nýggja kommunustýrið:

Listi A: Hugin Skaalum 66 atkvøður, Jón Joensen 48 atkvøður og Jóhan á Ørg 47 atkvøður.

Listi B: Eyð Ellingsgaard 126 atkvøður, Jóhan Mikkelsen 69 atkvøður, Elsebeth Davidsen 58 atkvøður og Sune Jacobsen 46 atkvøður.

Eins og sitandi sóknarstýri skipaði komandi seta seg við kvinnuligum borgarstjóra og varaborgarstjóra. Árini 2021-2024 fer Eyð Ellingsgaard at virka sum borgarstjóri og Elsebeth Davidsen sum varaborgarstjóri.

Nevndirnar eru hesar:

Fíggjarnevnd: Eyð Ellingsgaard, Hugin Skaalum og Jóhan á Ørg

Tekniska nevnd: Hugin Skaalum, Jóhan Mikkelsen og Jón Joensen

Trivnaðarnevnd: Jóhan Mikkelsen, Elsebeth Davidsen og Jón Joensen

Vinnunevnd: Jóhan á Ørg, Jón Joensen og Hugin Skaalum

Havnanevnd: Jóhan á Ørg, Elsebeth Davidsen og Jóhan Mikkelsen

Bygdaráðsfundir 2021.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2020. Fundirnir verða kl. 17:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið 27. januar

Hóskvøldið 25. februar

Hóskvøldið 25. mars

Mikukvøldið 28. apríl

Mikukvøldið 26. mai

Mikukvøldið 30. juni

Mikukvøldið 08. september

Mikukvøldið 29. september

Mikukvøldið 27. oktober

Mikukvøldið 10. november

Mikukvøldið 24. november

Mikukvøldið 08. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir á svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

At enda

2020 er av álvara farið at halla, og brátt skriva vit 2021.

Tykkum, sum nú skulu ráða fyri borgum, fari eg at ynskja góðan arbeiðshug, blíðan byr og bestu eydnu at stjórna kommununi. Politikkur er at hava visjónir og finna loysnir, men uttan dugandi og gagnligt áralag gerst lítið og einki. Eingin veit, hvussu 2021 fer at vignast, men tað er at fara við góðum treysti inn í nýggja árið og taka við teim uppgávum og avbjóðingum, sum tað nú einaferð fer at geva og stjórna allari kommununi so væl, sum til ber. Endamálið má vera, at í okkara kommunu skal vera gott bæði at búgva og virka.

Eg fari enn eina ferð at takka fyri samstarv og ta tíð, mær untist at stjórna kommununi. Til síðst fari eg vegna meg, bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár við ynski um eina bjarta framtíð.

Sørvági, nýggjársaftan 2020

Vinarliga

Sørvágs kommuna

Aimé Jacobsen, borgarstjóri

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2021

		Játtan		
		Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
§1.	**Kommunal fyrisiting**	**5.453**	-	-
	11. Felagsútreiðslur	5.453	-	-
§2.	**Almanna- og heilsumál**	**19.004**	**764**	**1.300**
	20. Heilsumál	1.751	-	-
	21. Almannamál	17.253	764	1.300
§3.	**Børn og ung**	**10.937**	-	**12.000**
	26. Barnaansing	10.937	-	12.000
§4.	**Undirvísing**	**4.405**	-	**300**
	23. Útbúgving og gransking	4.405	-	300
§.5.	**Mentan og frítíð**	**2.384**	-	-
	23. Útbúgving og gransking	593	-	-
	24. Mentan	1.791	-	-
§ 6.	**Teknisk mál**	**5.682**	-	**450**
	11. Felagsútreiðslur	1.576	-	400
	22. Íbúðarmál	-	-	2.250
	24. Mentan	362	-	-
	30. Umhvørvi	765	-	1.000
	38. Samferðsla og samskifti	2.980	-	1.300
§ 7.	**Kommunal virki**	**4.878**	-	**500**
	30. Umhvørvi	2.922	-	-
	31. Tilbúgving	574	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	1.382	-	500
	Tilsamans	**52.742**	**764**	**14.550**
§20.	22. Íbúðarmál	616	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	200	-	
	52. Skattir og avgjøld	-	60.713	-
	Tilsamans	53.558	61.477	14.550
	Yvirskot	-	7.919	-
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	-	**-6.631**	-
§25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-		-
	Nettokassaúrslit	-	-	-
§25.	62. Afturgjald av skuld	2.276	-	-
	Bruttokassaúrslit	**2.276**	**-6.631**	**8.908**
	Fígging:			
§25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	8.908	-
	Fíggjan í alt:	-	8.908	8.908
	Samanlagt	**2.276**	**2.276**	-

Høvuðsyvirlit yvir roknsskapin fyri 2019

		Játtan		
		Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
§ 1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.748**	-	-
	11. Felagsútreiðslur	3.748	-	-
§ 2.	**Almanna- og heilsumál**	**17.803**	**764**	**885**
	20. Heilsumál	1.613	-	-
	21. Almannamál	16.189	764	885
§ 3.	**Børn og ung**	**11.205**	-	**1.355**
	26. Barnaansing	11.205	-	1.355
§ 4.	**Undirvísing**	**4.795**	-	**1.678**
	23. Útbúgving og gransking	4.795	-	1.678
§. 5.	**Mentan og frítíð**	**3.249**	-	**34**
	23. Útbúgving og gransking	668	-	34
	24. Mentan	2.581	-	6.627
§ 6.	**Teknisk mál**	**4.460**	-	**4.842**
	11. Felagsútreiðslur	804	-	567
	22. Íbúðarmál	-	-	4.784
	24. Mentan	91	-	-
	30. Umhvørvi	651	-	539
	37. Handil og vinna annars	-	-	-1.450
	38. Samferðsla og samskifti	2.913	-	402
§ 7.	**Kommunal virki**	**4.178**	-	**2.744**
	30. Umhvørvi	2.691	-	-
	31. Tilbúgving	778	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	709	-	2.744
	Tilsamans	**49.437**	**764**	**11.539**
§20.	22. Íbúðarmál	685	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	170	-	
	52. Skattir og avgjøld	-	66.338	-
	Tilsamans	50.293	67.102	11.539
	Rakstrarúrslit	**-**	**16.809**	**-**
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	-	**5.271**	-
§25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	2.013	1.238	-
	Nettokassaúrslit	**2.013**	**6.509**	**4.496**
§25.	62. Afturgjald av skuld	4.496	-	-
	Bruttokassaúrslit	**6.509**	**6.509**	**-**
	Fígging:			
§ 25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	-	-
	Fíggjan í alt:	-	-	-
	Samanlagt	**6.509**	**6.509**	**-**